# Íslendskir menn liva longst



Meðallivialdurin hjá íslendskum monnum er hækkaður nógv tey seinnu árini. Morgunblaðið skrivar, at síðani 2000 er meðallivialdurin hækkaður tvey ár, og tað ger, at í dag eru íslendskir menn teir, sum hava hægsta meðallivialdurin í heiminum. Tøl hjá hagstovuni í Reykjavík vísa, at íslendskir menn liva í meðal 79,6 ár. Til samanberingar kann nevnast, at meðallivialdurin hjá monnum er 79,2 ár í Sveis, 78,9 ár í Liktinstein, 78,8 ár í Svøríki og Kýpros og 78,2 ár í Noregi. Íslendsku kvinnurnar liva í meðal 83 ár. Tað er kortini heldur stytri enn kvinnurnar í Fraklandi og Spania, sum hava tað evropeiska metið við 84,4 árum.

# Væl vitjaðar aftankvirrur

Hugtakið aftankvirra hevur fest seg alt meira í huga føroyinga. Kring landið verður skipað fyri aftankvirrum, har tað oftast eru kirkjur, ið eru karmur um tiltøk, har til ber at sita í kvirru í hugnaligari kirkju, tá farið er at skýmað. So er oftast tónleikur á skránni, og endað verður við andakt. Í Vagi hevur javnan verið skipað fyri aftankvirru í vetur, og hava fólk tikið væl undir, og hava hesar eisini eydnast sera væl. Sera nógvir tónleikarar úr allari Suðuroynni hava tikið væl undir við tiltakinum, og talið av vitjandi til aftankvirrurnar er vaksandi. Tá skipað varð fyri aftankvirru í Vágs Kirkju fríggjakvøldið 3. apríl, leitaðu eini 200 fólk sær í Vágs Kirkju, meta fyrireikararnir. Á www.sudurras.fo sæst ein upptøka frá eini av tónleikaframførslunum hetta kvøld. Fyrireikararnir siga seg ikki neyvt vita, um fleiri aftankvirrur verða innan summarsteðg, men í heyst verður í øllum førum farið undir hesi tiltøk í Vágs Kirkju aftur, siga fyrireikararnir.



*Rækjuskipið Arctic Viking hjá P/F Líðini í Kollafirði hevði avlop í rakstrinum í 2007. Hetta var fyrsta árið við avlopi í fleiri ár. Men í 2008 hevði skipið aftur hall. Útlit eru nú til, at rækjuflotin fer at hava eitt hampiligt ár í ár – helst tað besta í mong ár*

fiska 2570 tons av rækjum á Grand Bank sum er kvotan, ið Føroyar hava ásett sær í NAFO.

Í nøkur ár stongdi Kanada sínar havnir fyri føroyskum skipum, tí stjórnin ikki góðtók kvotuna, sum Føroyar loyvdu sær at veiða í altjóða sjógvi á Grand Bank, men hesin stongsul er av, og føroysk skip eru aftur vælkomin í kanadiskar havnir.

Jóhan Joensen sigur, at Arctic Viking legði veiðina upp í Ný Foundlandi ein túr í fjør heyst.

### Trekur marknaður

Nú fíggjarkreppa hevur herjað víða um heimin, hevur rækjuflotin eisini merkt trekleikan við prísunum á rækjum, sum eru lækkaðir nakað.

- Jú, vit hava eisini merkt altjóða fíggjarkreppuna, men vit vóna, at prísirnir fara at halda sær, so vit kunnu koma burtur úr hesum árinum við einum líkinda úrsliti.

Jóhan Joensen ásannar, at útlit eru til, at rækjuflotin við verandi gongd fer at hanga saman í ár, men hann ásannar eisini, at tað skulu ikki nógv viðurskifti broytast til tað verra, áðrenn ótryggleikin, sum í løtuni tykist ráða um allan heim, kann spæla hampiliga góðu útlitunum eitt puss.

- Tað er altíð trupult at spáa um tað, sum liggur fyri framman, men hetta er tað árið, tá vend kann koma í hjá rækjuflotranum, sigur formaðurin í Felagnum Rækjuskip.

# Klaksvíkingar fáa hjálp til føturnar

**Í Læknamiðstøðini í Klaksvík er ein fót terapetur farin til verka. Tað er Eydna Dragaberg, ið hevur latið upp eina fótklinikk, ið skal hjálpa klaksvíkingum við trupulleikum við fótunum**

FÓTARØKT
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Eydna Dragaberg í Klaksvík lat 2. mars upp fótklinikk við Sandin. Hon er útbúgvin sjúkrasystir, og hevur í mong ár fingist við heilsu og røkt innan eldraøkið. Eftir 25 ár í starvinum vildi hon finna onkra sergrein at arbeiða við, og fall valið á fótarøkt. Heitið er eftir røttum ein statsautoriseraður fótterapeutur, og er talan um 1½ ára útbúgving.

- Eg tók útbúgvingina í Randers, har tann eini av teimum tveimum skúlunum er at finna. Tað var ikki bara sum at siga tað, at sleppa inn. Fyri tað fyrsta kravdist útbúgving og royndir innan heilsu og røkt, og so tekur skúlin inn eftir hvørjum umráði, ein kemur úr, greiðir Eydna Dragaberg frá.

Tað eydnaðist kortini Eydnu at koma inn á skúlan, og kundi hon fyrst í mars mánaði í ár lata upp egna klinikk í Læknamiðstøðini við Sandin í Klaksvík. Hon húsast í somu hølum sum kommunulæknarnir og fysioterapeuturin, ið allir eru at finna í Læknamiðstøðini.

### Líktorn, harða húð ella vortir

Hvat ger so ein fót terapeutur?

- Fyri tað fyrsta fáa tey, sum koma til mín, eitt fótabað í fimm minuttir. Tað er umráðandi, at tað ikki er meir enn fimm minuttir, so húðin ikki skrædnar, og bakteriur sleppa til. So kanni eg føturnar fyri líktorn, harða húð og vortir, og skeri tað burtur, sum er til ampa fyri sjúklingin, og endar ein viðgerð við at føturnar verða innsmurdar í olju.

Eydna Dragaberg hevur ikki sitið arbeiðsleys, síðan fótklinikkin hjá Eydnu lat upp.

- Tað er nógv at gera. Nú eri tað ikki bara eg, sum fáist við fótarøkt í Klaksvík, men eg havi ikki sitið hendur í favn her. Eg hjálpi fólki, sum eru sjúk av diabetes, psoriasis og gikt, men fótklinikkin er eisini fyri tey, ið ynskja at geva fótunum eina góða viðgerð. Eitt sindur av vælveru, sigur Eydna Dragaberg.

### Sjúkrasystir á heimavølli

Fleiri av teimum, sum fáa tørv á hjálp frá einum fótrøktara, eru fólk, ið ikki nýta røttu skógvarnar, líða av svampi ella øðrum trupulleikum í samband við gerandisdagin, sum tey í langa tíð velja at síggja burtur frá, umframt tey, ið líða av sjúkum sum diabetes ella psoriasis.

- Men tað hoyrir eisini til mítt arbeiði at vegleiða um hvussu ein røktar sínar føtur í gerandisdegnum. Til dømis eru tað fleiri diabetikarar, ið ikki vita, at teir hava rætt til seks viðgerðir um árið frá einum fótrøktara. Tað fáa teir játtað við eini ávísing frá kommunulækna.

Fyri Eydnu Dragaberg var tað av týdningi at hon kundi arbeiða fyri seg sjálva, og kann leggja sínar arbeiðstíðir til rættis sjálv.

- Eg fari eisini út til fólk, ið hava brúk fyri tí. Og eg føli, at eg veruliga eri á heimavølli her. Barlastin, eg havi fingið gjøgnum mítt arbeiði sum sjúkrasystir, kemur mær av álvara til góðar í hesum arbeiðnum. Eg elski at fáast við fólk, og tað fellir mær náttúrligt at møta teimum, ið koma til mín fyri at fáa hjálp, sigur Eydna Dragaberg.




*Eydna Dragaberg er fegin um nýggju klinikkina, hon hevur latið upp í Læknamiðstøðini við Sandin. Fótarøkt er ætlað øllum, ið eru tarnað av trupulleikum við fótunum, og teimum, ið bert ynskja at geva fótunum eina góða viðgerð. Her hevur fótbóltsleikarin, Rógvi Jacobsen, sett seg í stólin, og latið føturnar upp í hendurnar á Eydu*

*Mynd: Norðlýsið*